# Ísfiskaskipini liggja á jólum

**- Øll skipini hjá okkum eru komin inn, og vit vænta ikki tær nógvu landingarnar aftrat fram til jóla, sigur Olaf Olsen á landingarmiðstøðini hjá P/F Beta í Saltangará**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki vanligt, at ísfiskaskipini eru úti um jólini. Okkurt undantak hevur tó verið av og á, og tað er ikki væl dámt av manningunum. Hinvegin er vanligt, at fleiri ísfiskaskip fara útaftur beint eftir jól, og tá er ikki vist, at manningarnar eru heima aftur á nýggjárinum. Tað veldst í fyrsta lagi um fiskiskapin millum jól og nýggjárs.



*- Tá ið vit eru liðug við landingarnar til jóla, fara vit at rudda upp á landingarmiðstøðini, og síðan fara vit eisini í jólafrí, sigur Olaf Olsen*

### Skipini inni

Øll skipini hjá P/F Beta í Saltangará eru komin inn at halda jól, og á landingarmiðstøðini í Saltangará, sigur Olaf Olsen, at teir vænta ikki tær nógvu landingarnar aftrat fyri jóla-hátíðina.

Garnabáturin, Jónrit, landaði týsdagin, og tá ið vit frættu frá Olafi, var uppá tal, at nýggju leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, kanska eisini fara at landa í Saltangará í vikuni.

Hetta er triði túrurin hjá nýggju leirvíkstrolarunum, síðan teir fóru í vinnu.

- Tá ið vit eru liðug við landingarnar til jóla, fara vit at rudda upp á landingarmiðstøðini, og síðan fara vit eisini í jólafrí, sigur Olaf.

Hann sigur, at fleiri av skipunum hjá teimum fara útaftur 3. jóladag og koma væntandi innaftur at landa 1. ella 2. januar.

- Eg veit ikki um nakað ísfiskaskip, sum verður úti um jólini, sigur Olaf Olsen

### Upsaprísurin

Olaf Olsen sigur, at hetta hevur verið eitt strævið ár hjá partrolarunum.

- Nógvur upsi hevur verið at fingið, men prísirnir eru einki batnaðir út á heystið.

Hann sigur, at skipini hjá Beta fáa góðar 3 krónur fyri kilo, og tað er sami prísur, sum hann annars hevur verið í heyst.

Spurdur, hví vit herfyri hoyrdu um prísir, sum lógu heilt niður ímóti 2 krónum fyri kilo, sigur Olaf, at talan her helst hevur verið um nøgdir av rættiliga smáum upsa.

- Men hetta eru ikki prísir, sum okkara skip hava fingið, leggur hann aftrat.

### Hvítur fiskur

Herfyri hoyrdu vit eisini um, at partrolarar vóru farnir at royna eftir hvítum fiski á Íslandsrygginum fyri at fáa betri prís fyri fiskin.

Sum skilst hava skipini fingið nakað av hvítum fiski, men Olaf sigur, at royndirnar hjá Beta eru, at tað loysir seg ikki betur at fiska hvítan fisk, soleiðis sum fiskiskapurin hevur verið.

- Hetta hava vit hildið, og hetta halda vit framvegis. Nøgdirnar av upsa eru nógv størri enn nøgdirnar av hvítum fiski, og vit halda, at tað hóast alt loysir seg betur at fiska upsa, sigur Olaf Olsen.

## Sandoyingar fisk niðurfyri til triðja jóladag

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alt bendir á, at sandoyingar fara at eiga fisk niðurfyri til, soleiði at tey kunnu fara aftur til arbeiðis longu triðja jóladag.

Ætlandi koma partrolararnir, Nornagestur og Kolumbus, inn at landa hósdagin, og soleiðis sum fiskiskapurin hjá trolarunum er, kann væntast, at skipini hava væl av fiski, hóast tey hava verið úti í minni enn eina viku.

Á Sandoy Seafood ætla tey at arbeiða hósdagin sum vanligt, og síðan verður steðgur til triðja jóladag, sum er mánadagur.

Sostatt hava sandoyingar, sum arbeiða á virkjunum á Sandi og í Skopun, nakað at fara uppaftur til morgunin eftir annað jólakvøld, ið vanliga er eitt gott dansikvøld kring landið.

# West Freeser landað í Miðvági

**Mánadagin landaði línuskipið, West Freeser, eini 80.000-90.000 pund í Miðvági**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stundum er langt ímillum landingarnar í Miðvági, men tað merkir ikki, at virkið hjá Føroya Fiskavirking liggur í fiskaloysi kortini. Ein stórur partur av veiðini, sum virkað verður á virkinum, kemur vestur í Vágar í bili.

Men mánadagin var línuskipið, West Freeser, á Miðvági við eini 80.000-90.000 pundum av fiski, harav stívliga 50.000 pund var hýsa, sum Fiskavirking í Miðvági keypti. Restin av veiðini hjá skipinum var toskur og annað.



### Liðug hósdagin

Í Miðvági hava tey arbeitt alla hesa vikuna, men Jason Johannesen, virkisleiðari, væntar, at tey verða liðug í rímiligari tíð hósdagin.

Á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági arbeiða tey serliga hýsu, sum fer til portiónir. Er lítil hýsa á marknaðinum – ella hon er ov dýr at fáa hendur á – verður nakað av upsa virkað til blokk.